gult12 cyan12 magenta12 svart12



# Óneyðugur skattalætti hjá reiðarum

Enn einaferð hava vit so hoyrt og sæð ein reiðara, hesaferð Bjarta Mohr í SVF týskvøldið, argumentera fyri tí óneyðuga og skaðiliga skattalættanum hjá fiskimonnum, sum reiðarar í veruleikanum fáa ágóðan av.

### Skattalættin varð gjørdur fyri at hjálpa reiðarum.

Í fyrsta lagi er als ikki talan um skattalætta til fiskimenn. Skattalættin verður á pappírinum givin til fiskimenn, men tá skattalættin varð framlagdur fyri fýra árum síðan, tá var grundgevingin ein heilt onnur. Grundgevingin var nevniliga, at fiskimenn fingu meira hýru aðrastaðni, og av tí at føroyskir reiðarar vóru so illa fyri, og ikki høvdu ráð at geva fiskimonnum meira hýru, so varð neyðugt at geva fiskimonnum ein skattalætta, so føroyskir reiðarar kundu sleppa bíligari. Sostatt er skattalættin til fiskimenn einki annað enn ein studningur frá landskassanum til føroyskar reiðarar.

Hesin skattalætti(studningur) var skaðiligur í 1997, og er tað enn meira nú. Ein undrast yvir, at nú inntøkurnar hjá føroyska feskfiskaflotanum (bæði hjá reiðarum og fiskimonnum), eru vaksnar útvið 50% tey seinastu fýra árini, at einki uppskot er komið um at avtaka henda reiðarastudning.

Reiðarar og ikki skattaborgarin eiga at gjalda fiskimonnum fyri harðbalnu arbeiðsumstøðurnar og teir longu arbeiðsdagarnar.

Fiskimenn hava munandi longri arbeiðsdag enn vanligir arbeiðsdagar uppi á landi og ofta eru arbeiðsumstøðurnar vánaligar. Tí eru vit flestøll samd um, at fiskimenn eiga at fáa munandi meira enn t. d. ein sum arbeiðir 8 til 5 arbeiði uppi á landi. Men sum í øðrum vinnum er tað arbeiðsgevarin, ið eigur at gjalda fyri langar arbeiðsdagar og strævið arbeiði. Í tann mun at strævna arbeiðið hjá fiskimonnum førir til, at teir verða útslitnir og tí fáa styttri arbeiðslív enn onnur, so eiga teir eisini at fáa hægri løn fyri hetta. Men tað er arbeiðsgevarin hjá teimum, sum hevur ábyrgdina av arbeiðsumstøðunum, sum eigur at gjalda fyri tað, og ikki landskassin.

### Fiskimenn fáa meir fyri skattakrónurnar enn nógv onnur í føroyska samfelagnum.

Í tann mun fiskimenn fáa nakað burturúr hesum skattalætta, so er hann eisini púra ógrundaður.Ført verður fram, at fiskimenn fáa einki burturúr goldna skattinum, og at teir tí eiga at gjalda minni skatt. Hetta er heldur ikki rætt. Fólk í besta aldri, eisini fiskimenn, fáa sjálvi lítið og einki frá landskassanum. Mestsum allur skatturin fer til at taka sær av gomlum og børnum, heilsu- og almanna- og skúlamál, t. e. skatturin verður nýttur til vælferðartænastur.

Skatturin verður nýttur til at taka sær av børnum hjá fiskimonnum, tá tey eru í skúla, framhaldsskúla, miðnámsskúla, barnagarði og vøggustovu. Hann verður nýttur til at taka sær av konunum hjá fiskimonnum (og teimum sjálvum) um tey gerast sjúk og skulu á sjúkrahús. Harumframt verður skatturin nýttur at taka sær av ommunum hjá fiskimonnum, tá hava brúk fyri heimahjálp og til at taka sær av abbunum hjá fiskimonnum, tá teir skulu á ellisheim.

Ein og hvør í arbeiðsførum aldri kann við at hugsa seg eitt lítið sindur um, sannføra seg sjálvan um at tað er sera lítið vit sjálvi fáa aftur av goldnu skattakrónunum.

Tískil fáa t. d. vit sum eingi børn hava nógv minni fyri skattakrónurnar enn fiskimenn. Sjálvur krevji eg ikki lægri skatt av hesi orsøk. Eg taki undir við at skúlagongd skal vera ókeypis, og at vit taka okkum av teimum gomlu. Eg rokni við at flestu fiskimenn taka undir við vælferðarsamfelagnum.

Eitt av fáu dømunum, har fiskimenn helst fáa minni fyri skattapeningin, enn onnur, er at vit sum arbeiða á landi nýta vegakervið minni enn onnur. Men heldur ikki sjónarmið er heilt beint, tí húskið hjá fiskimonnum nýtir veganetið nógv meir enn tey, sum búgva á útoyggjunum.

Tað er tí undarligt, at hoyra reiðarar og yvirmenn við milliónainntøkum, krevja skattalætta, vælvitandi at teir krevja somu vælferðartænastur sum onnur frá samfelagnum til teirra egnu familjur.

### Skattaborgarin hevur goldið fyri skipini hjá feskfiskareiðarunum.

Mest margháttligt er tað tó, at hoyra feskfiskareiðarar, t. d. Bjarta Mohr argumentera fyri hesum skattalættum. Í fyrsta lagi tí talan ikki er um skattalætta til fiskimenn, men um studning til reiðarar. Í øðrum lagi skal ein minnast til, at tá peningastovnarnir stóðu at fara á heysin, og máttu bjargast av skattaborgaranum, so fingu feskfiskareiðarar keypt skipini aftur fyri ein brotpart av tí sum skipini stóðu í. Oftast vóru skipini seld reiðarunum fyri umleið 30 prosent av tí tey stóðu í. Tapini í peningastovnunum av føroyska fiskiflotanum vóru goldin av føroyska skattgjaldaranum.

Føroyski skattgjaldarin hevur sostatt goldið 70 prosent av virðinum av feskfiskaflotanum sum óbeinleiðis stuðul til feskfiskareiðarar. Tað er tí skaðiligt fyri búskapin og førir til yvirkapasitet í fiskivinnuni at geva enn meira studning til reiðarar við at halda hjá fiskimonnum niðri.

### Trygging móti vánaligum fiskiskapi.

PS. Bjarti Mohr sigur skattalættan vera neyðugan, tí fiskimenn hava so ójavna inntøku. Henda grundgeving er heldur ikki røtt. Lógirnar um minstuløn og minstaforvinning syrgja fyri, at fiskimenn fáa eina hampuliga góða inntøku, sjálvt um eingin fiskur er at fáa. Eisini hesar skipanir verða goldnar av skattgjaldaranum.






Skipari:

# Vit løna tykkum øllum



*Kári Petersen, búskaparfrøðingur*

Bjarni Petersen, skipari á rækjutrolaranum »Artic Viking« í Kollafirði er ikki heilt samdur við sjónarmiðunum, sum Kári Petersen, búskaparfrøðingur kom fram við í sjónvarpinum hóskvøldið.

Kári Petersen, heldur ikki, at tað er rætt, at fiskimenn fáa sersømdir og skattalætta og hann vísti á, at fiskimenn sanniliga eisini eru brúkarar av vælferðarsamfelagnum, sum onnur rinda fyri.

-Tað er júst tað vit gera og enntá meira enn fólk á landi. Vit tjena harðar valuta til landið og harvið eisini løn til búskaparfrøðingar, sjúkrastystar og onnur, sigur Bjarni Petersen, sum í morgin fer yvir aftur á Flemmish Cap, at vinna harðan valuta til landið.



*Bjarni Petersen, skipari*

Bjarni Petersen leggur afturat, at tey gomlu hava gjøgnum eitt langt arbeiðslív longu goldið fyri ein tryggan aldurdóm og fyri pláss á røktarheimi

gult13 cyan13 magenta13 svart13



# Kappast um at vera fyrstur at bora

**Tað verður um reppið, hvat av teimum báðum oljufeløgunum, BP og Statoil, sum verður fyrst at seta borin í føroysku undirgrundina. Kann vera, at tað verður Statoil, sum hevur munin, tá avtornar. Bæði løgmaður og oljuráðharrin verða ætlandi hjástæddir, tá boringin byrjar**

STARTSKOT TIL OLJULEITING

*Jan Müller*




*Kortið er spildurnýtt og síggja vit longu, at Smedvig, sum eigur boriskipið West Navion hevur markerað fyrstu boringina á føroyska landgrunninum. Pílurinn er tilvildarliga settur. Boringin verður longur suðuri nær markið. Hinumegin markið er skipið við at bora fyri Conoco.*

Sum tíðin hevur gingið seinastu mánaðirnar hevur fyrst annað felagið staðið til at byrja fyrst, síðani hitt. Og so hava tey liðið borð um borð. Nú kann verða spurt, um hetta hevur nakran týdning fyri feløgini! Neyvan, um hugsað verður um endamálið sjálvt: at finna olju. Men nakað av prestisju er kortini í, hvat felag tað verður, sum setir borin í fyrst. Eitt nú tí at bæði løgmaður og oljumálaráðharrin eftir ætlanini skulu vera umborð, tá trýst verður á startknøttin, ella stutt eftir at boringin er byrjað.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at sjálvt um tað ikki er vanligt í øðrum londum, at løgmaður og oljuráðharrin fara umborð á boripall, tá boring byrjar, so hevði tað verið uppá sítt pláss hesaferð. Løgmaður sigur, at hann hevur frætt okkurt um, at hann møguliga skal umborð, tá byrjað verður at bora. Sjálvur heldur hann hetta vera so mikið stóra hending fyri Føroyar, at hann hevði verið fegin at fingið slíka innbjóðing.

Eftir tí Sosialurin skilur, so er tað nú heilt greitt, at boringarnar byrja umleið 15. juli ella møguliga nakað fyrr. Boripallurin Sovereign Explorer, ið skal bora fyri Statoil, Philips, Veba og Enterprise, kemur á boristaðið »Longan« umleið 5-7. juli. Síðani skal hann ankrast upp, og tað tekur so nakrar dagar. Boriskipið West Navion, sum skal bora fyri BP, verður á boristaðnum »Svínoy« í seinasta lagi 15. juli, men okkurt kundi bent á, at tað verður eina lítla viku fyrr, so mikið skjótt hevur gingist við arbeiðinum hinumegin markið. Tosað verður tí helst um tíðarskeiðið millum 8. og 15. juli, at tað verður byrjað at bora. Og tað er í hesum sambandi, at løgmaður og oljumálaráðharrin skulu til at gera seg klárar at fara umborð á antin boripall ella boriskip – at verða eygleiðarar til fyrstu boringina á landgrunninum nakrantíð. So nú fáa vit at síggja, hvør verður fyrr, BP ella Statoil. Men tá tað so kemur til at bora niður í løgini, har mett verður, at oljan finst, so fer tað at ganga skjótari hjá BP, tí tað er skjótari at bora við einum slíkum nútímans skipi enn við einum boripalli.

Sosialurin skilur, at í báðum førum verður borað rættiliga djúpt, helst einar góðar 4000 metrar niður. Blaðið skilur eisini, at bæði BP og Statoil fara at bora niður gjøgnum fleiri strukturar ella prospekt, sum tað verður rópt á fakmáli. Tvs. at møguleiki kann vera fyri at finna olju og gass í fleiri enn bara einum lagi. Nettupp hetta ger boringarnar so mikið spennandi og lovandi.

Nógv verður gitt um møguleikan fyri at raka við olju í fyrstu boringunum og um møguliga stødd á fundum. Tað hevur ljóðað, at bæði BP og Statoil síggja áhugaverdar strukturar, sum líkjast teimum, ið longu eru funnin bretsku megin markið og sum í dag framleiða stórar nøgdir av olju. Onkur kelda vil vera við, at hjá Statoil rokna tey við at finna eina ella annan elefant, sum er eitt risastórt fund. Eisini verður tosað um stórar goymslur av olju í øllum hesum økinum.




*Løgmaður fyrstu ferð hann vitjaði boripall í Norðsjónum sær fram til at vera til steðar, tá fyrsta boringin byrjar við Føroyar*

*Mynd: Jan Müller*



*Oljumálaráðharrin og fíggjarmálaráðharrin her á vitjan í Alaska fyri at læra av teirra royndum. Nú sleppa vit so at gera okkara egnu royndir*

*Mynd: Jan Müller*



*Eyðun Elttør, oljumálaráðharri metir komandi mánaðirnar verða nakrar av teimum mest týðandi og áhugaverdu fyri Føroyar nakrantíð.*

*Mynd: Jan Müller*